# Afzelius á føroyskum

TÓNLEIKUR
*Birgir Kruse*

Ein føroyskur tónleikabólkur og kendi sviin Michael Wiehe hei›ra›u Afzelius á stórfingnari konsert í Nor›urlandahúsinum t‡skvøldi›

Stórfingin konsert var í Nor›urlandahúsinum t‡skvøldi› har n‡ggja fløgan "Sangur til frælsi" var› løgd fram. Á fløguni eru 11 skeringar, sum allar taka stø›i í sangum hjá svianum Björn Afzelius, sum doy›i herfyri.

Til høvi› var settur saman ein føroyskur Afzeliusbólkur, sum framførdi 8 av sangunum á fløguni, eftir at mentamálará›harrin Tórbjørn Jacobsen hev›i sett sjøtul á.

Framúr var elektriski gittarin hjá Ólavi Øster og hin spanski hjá Herlufi Lützen. Hetta er fyri stóran part gittar-bundin tónleikur. Tónleikur, har gittarin er mi›depilin. Men tó eisini urgan og harmonikan, sum Jóan Petur Andreasen handfór. Torført er at taka nakran framum, so heilrunnin var føroyska framførslan. Ein studia í samanspæli. Tó havi eg huga at nevna Sámal Ravnsfjall. So framúr, sum eg ikki havi uppliva hann á›ur. Gó›ur tekstur, gott lag, gó›ur tónleikur. Og so dreiv. Mega dreiv. Beint eftir highway sixty six. Í minsta lagi. Vi› øllum hjólum snurrandi.

Eftir at føroyski bólkurin var li›ugur, kom lagsbró›ur Afzelius'ar Mikael Wiehe á pallin. Eisini hann førdi fram 8 sangir. Lutvíst n‡ggjar og lutvíst eldri og kendar. Hann var ikki sørt hugtikin av, at føroyski mentamálará›harrin hev›i Che Guevara í glas og rammu á dagliga arbei›sstа›num.

Eftir eina langa rundfer› í ára tíggju í ymsu heimspørtunum og ymsu ásko›anum, ættarli›ini hava havt hesa hálvu farnu øldina, lendi Mikael Wiehe heima og greiddi frá ódámliga n‡nasistiska rákinum á okkara egnu lei›um.

Og so kom frágrei›ingin um áskriftina á gittaranum, sum eg av fremstu rø› hev›i k‡tt meg at lesa. Jú, har stó›u gitnu or› Woody Guthries "This machine kills fascists". Or›ini eigur Guthrie. Og hann meinti tey. Skorin í gittaran. Eitt gott kvøld frá Che til Guthrie.




*Mikael Wiehe vi› gittaranum, sum hevur søguligu áskriftina "This machine kills fascists"*



Mentamálará›harrin á konsert í sambandi vi› n‡ggju fløguna »Songur til frælsi«:

# Bjørn Afzelius vi› føroyskari tungu

**Tórbjørn Jacobsen, mentamálará›harri, setti Afzelius-kvøldi› og seg›i:**

Eitt vetrarkvøld í Reykjavík. D‡rdin liggur yvir íslendsku høvu›sborgini. Tvær vikur eru sí›ani spola›ar uppá tí›arsnælduna. Ta› eru bara tveir hanar í mentamálará›harraskaranum í Nor›urlondum, og íme›an annar av teimum bá›um hevur siti› naka› leysur í sessinum hesa seinastu vikuna, so hava kvinnurnar hesi seinastu árini, so vi› og vi› klistra› seg fastar í hinar 6 sessirnar.

Hin solidi og fryntligi íslendingurin, Bjørn Bjarnason, hev›i bo›i› okkum til hábor›s, í móttøkuhúsinum vi› Tjørnuna, í mi›b‡num. Ein fjølbroyttur skari av politikkarum og embætismonnum. Elsebeth Gerner Nielsen sat hinumegin bor›i›, - kanska hev›i Bjørn skipa› ta› solei›is, fyri at vit ikki skuldu klóra eyguni út á hvørjum ø›rum. Og ísta›in hev›i hann sett Maritu Ulvskog, mentamála-rá›harra Sviaríkis, vi› mína li›.

Og hvat skuldi hesin smæ›ni glyvradrongurin so tosa vi› eina tilkomna damu úr Stockhólmi um. Eitt bygdafrell sum ikki hevur lært hitt politiska pli´i›. Nú, so dyggiliga ávara›ur av sínum formanni, vi› einum korti, sum ikki finst í nakrari ítróttargrein. Hvørki gult ella reytt, - men onkusta›ni harímillum. Ja, alt kann henda einum, i› livir eftir kredduni, leikum fagurt á foldum, eingin tre›ur dansin undir moldum.

Í eini roynd at bróta barieruna, spurdi eg Maritu, um hon kendi naka› til tónleikin hjá Bjørn Afzelius & Michael Wiehe. Og tá var í stundini leyst og li›ugt. Og vit kundu helst siti í fleiri sólarringar og or›skift um hesar bá›ar svensku úrmælingarnar.

Fortaldi henni um hesa konsertina, um fløguna, um fer›ina hjá Michael til Føroya og um stóra áhugan fyri Afzelius í Føroyum.

Eg gloymi ongantí›, hvar i› eg var staddur, tái› dey›sbo›ini frættust um Che Guevara, Martin Luther King, Robert F. Kennedy, John F. Kennedy, Salvador Allende & Olof Palme. Heldur ongantí› gloymi eg hin morgunin, tá i› Ívar bar tí›indini, kl. 0715, um, at John Lennon var skotin. Lá uppi í eini song úti í Hornabø, í einum leiga›um kjallarakliva hjá Oliviu Arge, ein hálvgingin sjómansskúlanæmingur, i› hev›i ilt vi› at koma fram, somiki› syrgdi eg hendan stóra meistaran. Og nú liggur eisini Bjørn undir moldum. Partapolitikkur skal og eigur ikki at ver›a tikin fram vi› eitt høvi sum hetta. Men eg sta›festi bara, at øll tingmanning tjó›veldisflokksins sat ni›ri á gamla Apotekinum, úti á ganginum, frammanfyri sk‡ggjan, tái› SVF, sum fyrsti tí›indastovnur í Føroyum, bar dey›sbo›ini. Og har gekk ma›urin, sum nú var farin heim til fedrar sínar. Súgvandi ein nikotinvindil fyri og annan eftir í seg. Og hetta var hansara bani. Gævi at vit kundu lært av hesum. Ella hoyra tit aftur bergmáli› frá or›unum. Leikum fagurt á foldum, eingin tre›ur dansin undir moldum.

Hjá okkum sum vuksu upp úti á politiska vinstravonginum í sjeyti-árunum, gjørdist Hoola Bandoola Band ein flógvur stimbur fyri sálina. Og ta› kom ongantí› nøkur slendrian í musikalsku og politisku sló›ina hjá Bjørn Afzelius. Hann stríddist treystur til ta› seinasta fyri tí sum hann trú›i á og helt vera rætt.

Men hesin vitborni sviin trú›i tó ikki politisku idealunum meiri enn ta›, enn at hann kundi sortera korn frá dumbu. Í sanginum "På Stormiga Vatten" yrkir hann um ta fer›ina, tá i› hann í eitt stutt tí›arskei› búleika›ist í einum kommunistiskum kollektivi í Gøteborg. Sum hann sjálvur sigur frá: "Einum meiri smáborgarligum og sjálvupptiknum skara av fólki havi eg ongantí› hitt. Ein og hvør hugmyndafrø›ingur hev›i avvápna› okkum eftir 10 minuttum. Orsaka› av vánaligari disiplin, ongum klassamedviti og lítlari politiskari vitan um yvirskipa›ar samfelagsspurningar. Eg helt út í 2 mána›ir, og tá i› eg var komin fyri meg aftur, yrkti eg hendan sangin. Satt at siga, ikki av óvart, sum ein country, tá i› hendan sjangran sjálvandi var hatursobjekti› hjá hesum vælsigna›a kollektivi. Møguliga komst hetta heldur av tí, at country- tónleikurin er tónleikurin hjá arbei›araklassanum í USA."

Og ta› sum hendi hjá fleiri av okkum, hendi eisini Birni. Hann forelska›i seg í hini kendu caribisku oynni, - henni hjá Fidel Castro. Í kollveltingini og fólkinum. Í tónleikinum. Hann vitja›i har yviri á fyrsta sinni í 1978. Saman vi› m.a. Michael Wiehe. Teir luttóku á einum heimsfestivali í Havanna, fyri øllum heimsins ungdómi. Og tá i› hann kom heimaftur, gjørdi hann hin serliga vakra sangin "Tankar i Havanna", i› saman vi› Don Quixote, kanska skuldi havt veri› vi› á fløguni, sum nú er útkomin. Ein lovsongur til politisku skipanina í Cuba. Men, sum vit hoyrdu hann siga í sjónvarpinum fyri kortum. Myndin av politisku skipanini í landinum modifisera›ist ikki so líti› tey seinastu árini, men haraftur-ímóti var› kærleikin til landi› og fólki› ósvikaligur. Sum hann seg›i, Cuba er og ver›ur mítt yndisland.

Ta› var Elvis Presley, sum fekk hann at syngja. The Beatles ávirka›u somiki›, at hann fór at leika á guitara. Og íme›an ta› var› Bob Dylan, i› fekk hann at hugsa um lyrikkin í rocktónleikinum, so var› ta› Michael Wiehe, i› fekk hann at skriva sínar egnu sangir.

Og harvi› er ta› Michael, sum er orsøkin til, at so nógvir føroyingar kunna sita her í kvøld og l‡›a á hesar fantastisku sangirnar. Hjá hesum skarpa manninum, vi› hvøssu konturunum, brillunum, cigarettini og guitarinum. Ma›urin, i› á síni lívslei› hitti so mætar menn sum Arafat, Mandela & Palme.

Fari at takka Michael Wiehe fyri, at hann leg›i lei›ina hendanvegin, nú tá i› føroyingar hei›ra vinmanni hansara. Takki eisini teimum, i› hava megna hetta stórverk, at fáa hesa fløguna út á markna›in. Hoyrdi ein part av henni nor›uri í Klaksvík fyri kortum. Og eftir at entreprenørurin, Steintór Rasmussen, hev›i veri› í mentamálast‡rinum í gjár, havi eg koyrt hana ígjøgnum nakrar fer›ir, - nú íme›an hesi or›ini vór›u grifla›i ni›ur.

Ta› hevur veri› sagt, at politiskur, progressivur rockur bara er ein døgnfluga, eitt rák, sum doyr út. Onki sæti í tónleikasøguni. Men hesum tók Bjørn ikki undir vi›. Og vit muna vera fleiri, i› eru samd vi› honum í hesum. Í 1996 skriva›i hann solei›is: "Vit komu úr hinum ópolitiska 60'ara poppinum, ta› hoyrist aftur í okkara tónleiki, og vit lótu stafettina ví›ari til radikalar punkarar sum t.d. Joakim Thåstrom, sum eisini hevur n‡tt okkara yrkingar. Og harvi› hava vit lati› okkara part til hin stóra mosaikkin, og gerast ongantí› t‡›ningarleysir. Eg eri errin av, at hava veri› vi› í tí progressiva tí›arskei›num. Alt var ikki gott, og ta› er fari› afturvi› bor›inum. Ta› gó›a ver›ur var›veitt. Og ta› sum er gott, ver›ur verandi gott, - til veraldar enda."

Ma›urin vi› hini snjøllu røddini er slókna›ur og røddin tagna›, men sangirnir fara at liva. Og í kvøld fer ein hópur av føroyingum at kveikja n‡tt lív í teir.

Eg lova›i Maritu Ulvskog, tá i› vit hittust í Reykjavík, at eg skuldi senda henni eitt eintak av fløguni, so skjótt i› eg hev›i fingi› fatur á henni. Í morgun fór hon loftvegis til Keypmannahavnar og ví›ari til Stockhólms. Ta› kundi harvi› hent seg, at svenski mentamálará›harrin sat í andakt og lurta›i eftir sínum kenda landsmanni, á føroyskum tungumáli, íme›an vit sita her og njóta hendan fráger›a tónleikin, sum ein av teimum stóru nor›urlendingunum fekk avrika›, - í sínum alt ov stutta lívi. Og landsst‡risma›urin í mentamálum skal ikki dylja yvir, at ta› er ein av hansara absolut stórstu idolum, i› ver›ur hei›ra›ur í kvøld. Njóti løtuna. Felagsskapin. Solidaritetin í sanginum. Sum altí› er hjá teimum veikastu og fæleysu. Og hugni tykkum eisini vi› eksplosiva skiftinum, ímillum ágangandi rockin og so hesar vøkru og troystandi og bleytu balladurnar. Ein ælabogi í tónum. Stimbur fyri sálina. Bót fyri tína framtí›.

Tí›indaskriv;

## Dario Fo á Meiarínum

Í kvøld kl. 20.00, skipar Leikhúsi› Gríma fyri einum kvøldi›, har i› Dario Fo ver›ur høvu›spersónurin á Meiarínum. Vit fáa at hoyra um lív og avrik hansara.

Fleiri leikbrot ver›a at síggja og ein monologur. Gríma hevur spælt fleir av leikunum hjá Dario Fo m.a. »Vit eiga ikki eitt oyra, vit lata ikki eitt oyra«, »Sjeynda bo› .... stjal eittt sindur minni«.

Eisini fáa vit at hoyra um listamannin og tann arbei›shátt hann hevur brúkt, i› hevur broytt nógv innan sjónleikarlistina, ikki altí› uttan at rubul hevur sta›ist av hesum.

Í 1997 fekk Dario Fo bókmentahei›ursløn Nobels, og var hetta á fyrst sinni, at ein i› arbeiddi vi› leiklist burturav bleiv hei›ra›ur á hendan hátt. Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni og vi› dyrnar.